# ÍTRÓTTUR ÍTRÓTTARTOYMIÐ



Tróndur Arge · Hilmar Jan Hansen · Heri Simonsen · Jóannes Hansen · Pætur Albinus · Álvur Haraldsen · André Olsen · Teitur Joensen · Pætur E. Jensen

***FULT UMFAR MIKUDAGIN** 20. umfar í Effo-deildini verður mikukvøldið. Tá tekur AB móti grannunum og oddaliðnum úr B36. Í Gundadali spæla HB og ÍF. Í Sarpugerði er KÍ á vitjan hjá Víkingi. B68 spælir á Toftum móti EB/Streymi, meðan grannauppgerð er á Skála, har NSÍ er á vitjan.*

## Ítróttar KLUMMAN

*Jákup Mørk*



## Guds børn batna

### Tað er ein gleðilig sensatión, nú ein dómari hevur viðgingið, at orðingin í dómarafrágreiðingini um reytt kort helst var í harðari lagi

Mistøk verða altíð partur av einum fótbóltsdysti. Tey flestu verða helst gjørd av spælarunum sjálvum, men ofta eru tað tey hjá dómarabólkinum, sum standa sterkast í minninum, tá diskussiónir um hetta og hatta fara fram.

Sjálvandi er dómaraposturin serliga útsettur, og sjálvandi skulu spælarar, venjarar og fjølmiðlar ansa sær, at dómarar ikki verða hongdir meira út, enn gott er.

Men tað nertir ikki tann veruleika, at dómarar í mongum førum verða viðfarnar sum heilagar kýr innan veggirnar í FSF. Eitt nú hevur hetta verið galdandi, tá leikbann skulu ásetast. Har er tað einvíst frágreiðingin hjá einstaka dómaranum, sum verður nýtt sum grundarlag.

Sjálvandi er tað fyrst og fremst dómarin sjálvur, ið veit, hví kort verður givið. Men vit hava tó meira enn tí einu ferðina sæð dømi um leikbann, har fólk uttan fyri vøllin standa spyrjandi. Eitt nú er ymiskt bann fyri "sera ljótan" ella bara "ljótan" atburð. Og subjektiva metingin hjá dómaranum, tá hendingin fór fram, kann jú vera sera ymisk. Og tað kann verða munurin millum onga revsins ella fleiri daga langt leikbann.

Í kærumálum er siðvenjan, at Kappingarnevndin spyr dómarabólkin, sum síðani staðfestur tað, sum teir fyr hava skrivað, men lukkutíð varð henda siðvenja broytt í vikuni.

Stórt rós til Rúna Gaardbo og hansara bólk, nú teir ásannaðu, at orðingin í frágreiðingini um leikbannið Hans Jørgen Djurhuus helst var nakað hørð. Her er talan um erligheit og sjálvrannsakan, og hesum hevur onkra tíð verið saknur í.

Tað skerst tó ikki burtur, at ein spurningur framvegis stendur eftir: Hevði leikbannið framvegis verið fýra dagar, um Víkingur ikki hevði kært? Hevði dómarabólkurin sjálvur reagerað, og sagt, at teir altso ikki hildu, at fýra dagar vóru í lagi?



# ROK Í B36-HÚSINUM ONKI EFTIRSPÆL

Tað fær einki eftirspæl, at tað bleiv áfast millum venjaran hjá NSÍ, Trygva Mortensen, og Tórður Thomsen, málverja hjá B36, eftir at B36 vann 1-0 á NSÍ í Gundadali fyri eini viku síðan.

Formaðurin í kappingarnevndini, Jákup Martin Joensen, váttar at einki mál er komið á borið hjá honum viðvíkjandi hendingini.

Tað var í B36-húsinum, beint uttanfyri skiftingarrúmini, at bæði Tórður Thomsen og Trygvi Mortensen vildu hava orðið á dómaran í dystinum. Tað endaði við, at tað bleiv áfast millum Trygva og Tórður. Fleiri spælarar komu upp í og eina løtu var talan um rættuligt rok. Sum skilst á øllum pørtum, so dempaði hetta seg skjótt aftur, tá vaktir og umboð fyri bæði liðini komu í millum. Hendingin fór fram beint frammanfyri dómaranum, Rúna Gaardbo, sum tó ikki hevur noterað hendingina í dómarafrágreiðingina.

- Eg og Trygvi skeldaðust eitt sindur aftan á dystin, tí at vit báðir vildu sleppa at práta við dómaran, men meir enn tað var tað ikki, greiðir Tórður Thomsen frá.

B36 vann dystin 1-0. Sum skilst, so var Tórður Thomsen ónøgdur við at fáa gult kort fyri at drála, meðan venjarin hjá NSÍ ilskaðist um at ov fáir minuttir vóru langir afturat. Trygvi og Tórður kennast væl og hava slættað sjógvin.



- Eg og Trygvi skrivaðu saman aftan á dystin og slættaðu sjógvin okkara millum. Alt í alt, vit vóru báðir heitir og báðir ónøgdir við onkra avgerð hjá dóminarinum, og tað førdi so til ein lítlan orðadrátt okkara í millum, sigur málverjin hjá B36 at enda.

*trondur@sosialurin.fo*



## Heimasíðurnar skriva:

**www.ab.fo:**
*vit fingu tað eina stigið og sum vit vita frá okkum sjálvum, so er ikki nokk at hava møguleikar, men ein skal eisini skora uppá teir.*

**www.b36.fo:**
*Tað er spennandi at halda við B36! Hóast mest sum total-dominans í góðan tíma og fleiri góðar støður, so vórðu vit hildin á pínubeinkinum í 90 minuttir, áðrenn stigini móti Skála vórðu staðfest*

**www.vikingur.fo:**
*Í stuttum kann sigast um seinna hálvleik at liðini vóru í álopi 3 ferðir samanlagt. Víkingur í 2 ferðir á 22 minuttir og AB eina ferð í 1 minutt. Vit fingu eitt mál so dysturin endaði 2-2.*

**www.hb.fo:**
*Vit royna áhaldandi at hanga í, í oddinum, og góði og sannførandi sigurin við Margáir í dag, staðfestir at vit leggja okkum ikki uttan víðari.*

**www.07vestur.fo:**
*Eftir at hava skorað leiðslumálið tíðliga í øðrum hálvleiki, megnaðu vit ikki at halda fast, og FC Suðuroy fingu javnandi málið tá einir 10 minuttir vóru eftir. Torstein skoraði okkara mál.*

**www.svimjing.com:**
*Pál Joensen er millum favorittarnar á EM 2014 í bæði 800 og 1500 metra frísvimjing, sambært tí fyribils startlista sum varð givin leiðarum á tekniska fundinum í Berlin í dag. Í 800 metra frísvimjing liggur hann til eitt bronsuheiðursmerki, og í 1500 metra frísvimjing til eitt fjórðaplláss.*

**Besta sms'ið í Triða Hálvleiki hjá Rás2:**

*Besta liðið hjá EB/Streymi møtti ikki upp í dag, tí allir vóru í brúðarhús hjá Hans Paula.*
*Tískil møtti 2 liði upp :)*

*(EB/Streym-HB)*

